# num Freuchen Vági




*Hans Pauli Strøm røddi eisini og tosaði m.a. um stóru broytingarnar, ið tíðin hevur við sær*

Freuchen, ið eisini gjørdist kendur høvundur og filmstjørna; ein legenda. Hon mintist hendan stórmannin við sínum træbeini og fullskeggi. Træbein hevði hann orsakað av einum frostskaða. Hann var vinmaður hin minst líka kenda pólfaran Knud Rasmusen.

Hanne Mia greiddi frá, at hon mintist kríggini bæði. Og sjálvandi mintist hon eisini ógvusligu ristingarnar í Vági í sekstiárunum. Hetta var óhugnaligt, greiddi hon frá, tí slíkar ristingar eru ikki vanligar á okkara leiðum, og hon, eins og aðrir suðuroyingar, fór norðeftir.

## Kongabrúgvin

Tá hon fyrstuferð vitjaði í Havn, væntaði hon sær at síggja eina vakra brúgv; Kongabrúnna. Men hetta varð, sum vituligt er, eitt skuffilsi, tí lítið kongaligt mundi vera við Kongabrúnni, samanborið við tað, ið hon hevði hugsað sær.

Hanne Mia segði seg bert hava góð minnir og lívið er farið við tí triviella.

– Om 100 ár er alting glemt, endaði Hanne Mia samrøðuna.

## FAKTA

### Stutt um Peter Freuchen

Hann livdi frá 1886 til 1957.
Var kendur pólfari og gjørdi fyrstu ferðina til Grønlands í 1906. Sama ár, sum Hanne Mia er fødd.
Hann gjørdist legenda í egnu samtíð síni. Høvundur og filmstjørna.
Hann giftist við grønlendskari kvinnu. Hetta var ikki væl sæð allastaðni tá á døgum.
Fekk frostskaða og hevði tí træbein. Setti seinni búgv uttanfyri Danmark. Gjørdi m.a.filmin Eskimo, ið varð tikin upp í Hollywood og í Alaska í 1930.
Í 1910 samdust Peter Freuchen og Knud Rasmussen um at kalla handilsstøðina, teir nýttu, fyri Thule.



*Peter Freuchen*



*Peter Freuchen og Knud Rasmussen í 1913*






*Dagurin byrjaði við, at skúlabørn og dagstovnabørn møttu uttan fyri húsini hjá Hanne Miu, ið kom út at heilsa mannamúgvuni*

